## Felag í verkætlanarleiðslu undir stovnan í Føroyum

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Mikudagin verður stovnandi aðalfundur í felagi í verkætlanarleiðslu. Felagið er ikki ætlað til nakað ávíst fakøki, men til fólk, ið starvast við verkætlanum. Tað er ein bólkur av virkandi verkætlanarleiðarum, sum tekur stig til at stovna felagið.

Tørvurin á verkætlanarleiðarum er vaksin í Føroyum seinastu árini, serliga tí at alsamt fleiri virki skipa sínar uppgávur í verkætlanum, har m.a. tíðar- og fíggjarætlanir verða fastlagdar.

Ein av uppgávunum hjá nýggja felagnum verður at miða ímóti at gerast limur í altjóða felagnum IPMA, International Project Management Association.

IPMA hevur eina áhugaverda altjóða próvtøkuskipan innan verkætlanarleiðslu. Skipanin er býtt upp í fýra stig, har møguleiki er at fáa prógv sum verkætlanarleiðari á D-støði, sum er tað lægsta og upp til A-støði, sum er tað hægsta. Ætlanin er at hava próvtøku á D-støði í Føroyum í juni mánaða í ár.

Ætlanin er at felagið skal verða við til at skapa eitt umhvørvi, har møguleiki verður hjá verkætlanarleiðarum at hittast og mennast. Ætlanin er ikki, at felagið skal skipa fyri skeiðum, men í staðin hava kunnandi fundir og onnur viðkomandi tiltøk.

Stigtakararnir hava samskifti við felagið fyri danskar verkætlanarleiðarar "Foreningen for dansk projektledelse", og verður føroyska felagið eitt økisfelag undir danska felagnum fyrstu árini.

Kunnandi fundur verður mikudagin 18. mai 2005 kl. 15.00 í høvuðssetrinum hjá Føroya Tele í Hoyvík, har Morten Fangel frá "Foreningen for dansk projektledelse" er við.

- Árni Jakobsen frá Sofus M. Jakobsen, bjóðar vælkomin.
- Kári Dal-Christiansen frá Føroya Tele, greiðir frá verkætlanini Klingran.
- Morten Fangel greiðir frá IPMA próvtøkuskipanini.
- Morten Fangel kunnar um "Foreningen for Dansk projektledelse" og "Nordnet".
- Sigurd Lamhauge frá P/F Norðoyatunnil, greiðir frá fyrimunum við einum føroyskum økisfelagi.

Klokkan 17.00 verður stovnandi aðalfundur av felagnum. Tilmelding fer fram á www.projektforeningen.dk ella kdc@ft.fo




# Westward Ho kemur heim

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Seinastu trý árini hevur Westward Ho verið burturi, men um veður og vindur eru til vildar, kemur hon heimaftur í týsdagin 24. mai. Teir fyrstu av manningini fara niður til Skotlands í morgin, og restin kemur í vikuni. Ætlanin er at loysa sunnudagin 22. mai. Væntandi tekur túrurin eini tvey samdøgur.

Westward Ho er høvuðsumvæld, og arbeiðið hevur verið nógv og drúgt. Ein av høvuðsorsøkunum longu útisetuna, er arbeiðið við at fíggja umvælingina. Her hevur skipasmiðjan í Fraserburgh verið stak lagalig, og við at leggja arbeiðið við sluppuni, tá arbeiðið annars hevði ligið stilt, hevur prísurin eisini verið rímuligur.



*Westward Ho, við bryggju í Fraserburgh.*

# Fimm bátar til Grønlands




*Tríggir av bátunum, sum AWI Boats hevur selt til Grønlands, fóru við Dettifossi fríggjadagin*

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

AWI Boats hevur selt fimm bálar til eitt grønlendskt felag í Sisimiut. Tríggir av av bátunum fóru fríggjadagin við Dettifossi hjá Skipafelagnum. Leiðin gekk fyrst til Íslands og frá Íslandi víðari til Sisimiut í Grønlandi.

Teir tríggir bátarnir verða í Sisimiut 26. mai 2005. Talan er í hesum umfari um tveir AWI STAR 35 og ein AWI 33. Seinri í hesum mánaðinum verður tann fjórði AWI 33 avskipaður og tann fimti fer um hálvan august, hesin er av slagnum AWI STAR 35.

Bátarnir fara í Grønlandi at royna við snellu, línu og gørnum. Fyrstu tíðina verður roynt eftir toski, men møguleiki er eisini at fiska krabba og svartkalva.

Eins og bátarnir eru føroyskt bygdir er fiskireiðskapurin eisini føroyskur. Snellurnar og línispølini eru frá J.K. Joensen í Miðvági og línan o.a. frá Teymavirkinum í Saltangará.

# Tú lærir av at leita aftur

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hjúnini Tove og Béla Detreköy høvdu í vikuskiftinum skeið í violinspæli fyri millum 45 og 50 violinnæmingum. Skeiðið endaði við stórfingnari violinkonsert í Vesturkirkjuni sunnudagin.

Næmingarnir í aldrinum 6 til 20 ár framførdu eina skrá av spennandi verkum av Bach, Vivaldi, Brams, Händel, Suzuki og nógvum øðrum.

Konsertin var væl vitjað, og eydnaðist stak væl. Fyrireikararnir vóru væl nøgdir við alt vikuskiftið. Konsertin var bygd upp soleiðis, at fyrst spældu tey elstu, síðan komu fleiri og fleiri til, og til seinast spældu øll saman. Tey eldru luttóku í spæliningini av teimum verkum, sum tey plagdu at spæla, tá tey vóru yngri. Av hesum læra tey nógv.

Sambært lærunum, lærir man ótrúliga nógv við at venda aftur til eitt stykkið, sum man fyrr hevur spælt.

Teir yngru næmingarnir læra eisini av at spæla við teimum eldru, og av at lurta eftir teimum stykkjum, sum tey skulu spæla, tá tey gerast eldri. Harumframt læra øll av samanspælinum, og fáa samstundis eina jaliga uppliving.